

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 01 - 2012

# Virkið vinnulív í Eysturoynni

Eysturoyggin hevur leingi verið í fremstu røð, tá tað snýr seg um vinnumenning í Føroyum. Hetta síggja vit eisini, tá tað snýr seg um nýggjar vinnugreinar so sum oljuvinnu. Og hetta kom so sannliga eisini til sjóndar, tá uttan iva virknasta vinnufelagið í landinum, Eysturoyar Vinnulívsfelag við sínum 99 limum, skipaði fyri limafundi í Runavík mikukvøldið. Oljan.fo var eisini við til tiltakið og vísa vit til grein og myndarøð frá tiltakinum. Mynd - Rannvá Troest, sum er við til at samskipa og skapa áhuga fyri vinnutiltøkum i Runavík og Eysturoynni annars, her á fundinum hjá Eysturoyar Vinnulívsfelag í Sjókaféini í Runavík mikukvøldið, har ikki færri enn 70 fólk møttu at hoyra um oljuvinnu og Mest. Mynd - oljan.fo/Jan Müller